Kommunala Arbeiðsgevarafelagið

# Ársfrágreiðing

2022

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið

# Innihaldsyvirlit


Vælkomin ... 2
Samráðingar og seming í 2022 ... 3
  Starvsfelagið ... 3
  Heilsuhjálparafelagið ... 3
  Fysio- og Ergoterapeutfelagið ... 4
  Havnar Arbeiðarafelag ... 4
  Sáttmálar, ið fóru úr gildi í 2022 ... 4
  Samgonguskjalið ... 5
    Lønarlyft ... 5
    Fyrireikingartíð og normeringar á dagstovnaøkinum ... 6
Sáttmálasamráðingar 2023 – ... 7
  Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar ... 7
  Føroya Handverkarafelag / Landsfelag Handverkaranna ... 7
  Pedagogfelagið ... 8
Átøk sambært sáttmála ... 8
  Tilmæli – fyrireikingartíð á dagstovnaøkinum ... 8
  Ávegis átøk ... 9
    Átak viðv. vaktarskipanini á Sløkkiliðsstøðini ... 9
    Átak viðv. setanarviðurskiftunum hjá heilsu- og heimahjálparum ... 9
Arbeiðsbólkar ... 10
  Broytingar í starvsmannalógini ... 10
Netverk ... 10
  Dagstovnaøkið ... 10
    Markamót móti Almannaverkinum ... 11
    Broyting í tænastuni frá Sernám ... 11
Hagtøl á dagstovnaøkinum ... 11
Samsýning til borgarstjórar ... 12
Gerðarrættarmál ... 12
  Starvsaldur tá stig fella burtur ... 12
Samanumtikið ... 13
Viðtøkur fyri Kommunala Arbeiðsgevarafelagið ... 15

# Vælkomin

Góðu fundarfólk!

Eg vil bjóða tykkum øllum hjartaliga vælkomin á ársfund okkara í Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum.



Fyrst av øllum so fari eg at takka nevndini fyri álitið, sum hendan vísti mær, tá eg varð valdur til formann í Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum í september mánaði í 2022.

Undanfarni formaður, Pauli T. Petersen valdi at taka seg úr politikki, fór frá sum borgarstjóri í Vestmanna og formaður í Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum.

Síðani eg gjørdist formaður í Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum hava vit í ótíð havt Løgtingsval – og vit hava fingið eitt nýtt landsstýrið. Eitt landsstýrið, sum í valstríðnum vísti á viðurskifti á arbeiðsmarknaðinum, sum tey ynsktu at broyta. Víst var í fleiri førum á broytingar, sum fóru at hava stóra ávirkan á kommunala sáttmálaøkið, harímillum kann vísast á ætlanina hjá landsstýrinum at geva lægst løntu starvsbólkunum eitt lønarlyft, at stytta arbeiðsvikuna niður í 37 tímar, at arbeiða við normeringum á dagstovnaøkinum – og at seta meira tíð av til námsfrøðiliga arbeiðið á kommunala sáttmálaøkinum. Talan er í øllum førum um viðurskifti, sum hava stóra ávirkan á framtíðar kostnaðin fyri dagstovna- og eldraøkið og á kommunala arbeiðsmarknaðin í síni heild.

Í ársfrágreiðingini verður greitt frá virksemi felagsins í 2022.

Greitt verður frá gongdini í samráðingunum í undanfarna ári og fram til í dag. Víst verður eisini á nøkur av teimum mest týðandi málum, sum arbeitt var við í undanfarna ári – og hugt verður eisini frameftir.

# Samráðingar og seming í 2022

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið var í samráðingum við Starvsfelagið og Heilsuhjálparafelagið við ársbyrjan í 2022. Samráðingarnar byrjaðu um heysti í 2021, tá sáttmálarnir fóru úr gildi tann 1. oktober 2021.

Samráðingarnar við ávikavist Starvsfelagið og Heilsuhjálparafelagið gingu sína gongd, ein kann siga, at alt gekk væl, men partarnir funnu ikki semju um sjálva lønarhækkanina. Soleiðis endaðu samráðingarnar við bæði Starvsfelagið og Heilsuhjálparafelagið við semingsroynd í ávikavist januar og februar 2022.

Greitt er áður frá úrslitinum av semingini, men eg fari at taka aftur í aftur høvuðsbroytingarnar í tíðarskeiðinum fyri hvørt felag sær.

## Starvsfelagið

Samráðingarnar við Starvsfelagið vóru í stóran mun merktar av ósemju um kostnaðin av sáttmálanum, av lønarhækkanini, sum skuldi galda í tíðarskeiðinum frá 1. oktober 2021.

Eftir drúgvar men góðar samráðingar gjørdu partarnir í januar mánaði í 2022 av at royna seming. Semingsroyndin endaði tann 13. januar við eini 3 ára semju og lønarhækkanum, sum vóru settar saman í prosentum og krónum soleiðis:

- Tann 1. januar 2022 hækkaðu lønirnar 1,25%
- Tann 1. oktober 2022 hækkaðu lønirnar á lønarstigunum 1-20 við kr. 740 og á lønarstigunum 21-50 við kr. 540
- Tann 1. oktober 2023 hækka lønirnar 2,75%

Partarnir hava í samansetingini av lønini lagt dent á at raðfesta hægri lønarhækkan til lægst løntu bólkarnar í felagnum.

Umframt broytingar í lønunum og í øðrum gjøldum gjørdu partarnir semju um at kanna um vaktarskipanin hjá sløkkiliðsfólkunum í Tórshavn er tíðarhóskandi. Vaktgangandi starvsfólkini fingu eitt munandi lyft í vaktargjaldinum, og avtalað varð gjørd um at kanna viðurskiftini nærri.

Partarnir gjørdu semju/protokollat um, at kanna vaktarskipanina á Sløkkiliðsstøðini í Tórshavn. Greitt verður nærri frá gongdini í hesum arbeiðinum niðanfyri.

Partarnir gjørdu eisini avtalu um at kanna og raðfesta onnur viðurskifti í sáttmálaskeiðinum, sum gongur fram til 1. oktober 2024, harímillum at kanna møguleikan fyri at endurskoða bygnaðin í lønartalvuni og at varpa ljós á førleikamenning o.a.

## Heilsuhjálparafelagið

Samráðingarnar við Heilsuhjálparafelagið snúðu seg í stóran mun um at lyfta lønina hjá limum felagsins. Síðani partarnir ikki av sínum eintingum funnu semju um lønina, so endaðu samráðingarnar í seming.

Lønarhækkanin til limirnar í Heilsuhjálparafelagnum er á støði við hækkingarnar í semjuni við Starvsfelagið:

- Tann 1. januar 2022 hækkaðu lønirnar 1,25%
- Tann 1. oktober 2022 hækkaðu lønirnar við kr. 710
- Tann 1. oktober 2023 hækka lønirnar 2,5%

Umframt omanfyri nevndu lønarhækkan fingu heima- og heilsuhjálparar nýggj endastig. Soleiðis var dentur lagdur á at hækka endalønirnar hjá limum felagsins.

Í samráðingunum viðgjørdu partarnir í fleiri umførum setanarviðurskiftini hjá starvsfólkunum á økinum. Heilsuhjálparafelagið hevur í fleiri umførum víst sína ónøgd við, at arbeiðsgevarar í alt ov stóran mun velja at seta heimahjálparar í tímalønt størv, heldur enn at bjóða teimum fasta setan, og harvið tryggari setanarviðurskifti.

Heilsuhjálparafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið samdust um at halda fast í gamla protokollatinum um at kanna setanarviðurskiftini hjá limum felagsins – og frameftir at varpa ljós á fakligheitina hjá limum í Heilsuhjálparafelagnum. Greitt verður nærri frá hesum átaki niðanfyri.

## Fysio- og Ergoterapeutfelagið

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið hevur gjørt serstaka avtalu við Fysio- og Ergoterapeutfelagið um at fylgja sáttmálanum millum felagið og Fíggjarmálaráðið, umframt at vit hava serstaka avtalu um flokkingar á kommunala sáttmálaøkinum. Soleiðis, hevur Kommunala Arbeiðsgevarafelagið fylgt hesum sáttmálum – og verið við í samráðingunum eftir tørvi.

Lønarhækkanin í tíðarskeiðinum var tann sama, sum fyri onnur fakfeløg, men samansetingin ein onnur – í og við, at felagið valdi at lækka eftirlønargjaldið úr 15,8% niður í 15%.

Sáttmálin er endurnýggjaður fyri tíðarskeiðið heilt aftur til 1. oktober 2020 og fram til 1. januar 2023.

- Tann 1. januar 2021 hækkaðu lønirnar 2,05%
- Tann 1. oktober 2021 hækkaðu lønirnar 1,25%
- Tann 1. januar 2022 lækkaði eftirlønargjaldið úr 15,8% niður í 15%.

Tillagingar vóru gjørdar í lønartalvuni, sum samsvaraðu til lønarhækkanina í tíðarskeiðinum.

Leiðaralønirnar vóru nágreinaðar, eisini lønirnar til leiðarar á eldraøkinum vóru greitt avtalaðar í semjuni.

Semja varð undirskrivað við Fysio- og Ergoterapeutfelagið tann 28. januar 2022.

Sáttmálin fór úr gildi aftur 1. januar 2023 – og samráðingarnar verða tiknar upp aftur í næstum.

## Havnar Arbeiðarafelag

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Havnar Arbeiðarafelag hava sáttmála um starvsfólk, sum arbeiða á Brennistøðini í Tórshavnar kommunu. Talan er um ein sersáttmála, sum Kommunala Arbeiðsgevarafelagið hevur yvirtikið frá Tórshavnar kommunu í 2019.

Sáttmálin fylgir høvuðssáttmálanum millum Havnar Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag. Sersáttmálin er ikki endurnýggjaður fyri tíðarskeiðið aftaná til 1. mai 2020.

## Sáttmálar, ið fóru úr gildi í 2022

Fleiri av sáttmálunum hjá Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum fóru úr gildi tann 1. oktober í 2022. Harímillum sáttmálarnir við Danska Tannlæknafelagið, Føroya Skipara- og Navigatørfelag, Heilsurøktarafelagið og Maskinmeistarafelagið.

Samráðingarnar við Heilsurøktarafelagið fóru í gongd sum vanligt, partarnir handaðu hvørjum øðrum krøv tann 26. oktober í 2022. Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, Fíggjarmálaráðið og

Heilsurøktarafelagið vóru í felags samráðingum, men avtalaða fundarrøðin bleiv einans til ein einstakan fund, áðrenn samráðingarnar steðgaðu orsakað av, at val varð útskrivað.

Sáttmálasamráðingarnar steðgaðu upp orsakað av politisku støðuni, tí bíðað var eftir, at nýtt landsstýrið tók við.

Nýggja landsstýrið tók við um ársskiftið og nýtt samgonguskjal varð lagt fyri dagin. Eitt samgonguskjal, sum í fleiri mátar legði seg út í kommunal viðurskifti. Samgongan hevur stungið út í kortið ætlanir um eitt lønarlyft til starvsfólk, sum í stóran mun virka á kommunala sáttmálaøkinum, á dagstovna- og eldraøkinum.

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Fíggjarmálaráðið hava havt fundir um komandi samráðingarnar, um ætlaða lønarlyftið og afturberingina av ætlaða lønarlyftinum.

Semja er nú um at byrja samráðingarnar aftur í næstum, og at bíða við lønarlyftinum, altso at halda lønarlyftið uttanfyri vanligu samráðingarnar. Greitt verður nærri frá lønarlyftinum undir pettinum um samgonguskjalið.

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið skal samráðast við hesi fakfeløg í vár og í heyst: Danska Tannlæknafelagið, Føroya Skipara- og Navigatørfelag, Heilsurøktarafelagið, Maskinmeistarafelagið, Føroya Handverkarafelag/Landsfelag Handverkaranna og Føroya Pedagogfelag.

Fíggjarmálaráðið hevur í sama tíðarskeiði fleiri samráðingar um sáttmálar, sum verða brúktir á kommunala sáttmálaøkinum, harímillum sáttmálin við Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar. Kommunala Arbeiðsgevarafelagið luttekur í hesum samráðingum eftir tørvi.

## Samgonguskjalið

Fleiri av vallyftunum hjá CDF samgonguni koma at hava beinleiðis ávirkan á samráðingarnar á almenna og kommunala arbeiðsmarknaðinum. Harímillum kunnu vit nevna fráboðanina um eitt lønarlyft til starvsfólk á umsorganarøkinum, ætlanina at stytta arbeiðsvikuna niður í 37 tímar við lóg. Í samgonguskjalinum verður eisini komið inn á eitt av kjarnuøkjunum hjá kommununum "dagstovnaøkið". Í hesum sambandi verður lagt upp til, at arbeiðast skal við at seta meira tíð av til tað námsfrøðiliga arbeiðið "fyrireikingartíð" og at arbeiðast skal við normeringum í dagstovnalógini.

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið heitti tí beinanvegin á lønardeildina í Fíggjarmálaráðnum um fund at umrøða víðari samráðingarnar vísandi til rammuavtaluna, sum partarnir hava gjørt viðv. samstarvi um arbeiðsmarknaðarviðurskifti og sáttmálasamráðingar.

Viðurskifti, sum høvdu serligan týdning at viðgera vóru karmarnir fyri víðari samráðingunum og ætlanirnar hjá nýggja landsstýrinum á hesum øki. Umframt at fáa greiðu á kørmunum fyri víðari samráðingunum, var tað umráðandi at viðgera nøkur av vallyftunum hjá nýggju samgonguni, sum í sera stóran mun koma at ávirka kommunala sáttmálaøkið, serliga dagstovna- og eldraøkið.

## Lønarlyft

Í samgonguskjalinum verður staðfest at nøkur av okkara lægst løntu starvsfólkum á umsorganarøkinum skulu hava eitt lønarlyft. Landsstýrið hevur nú boðað frá, at teir bólkar, ið verða fevndir av lønarlyftinum eru: námsfrøðingar, námsfrøðihjálparar, hjálparfólk, heilsurøktarar og heima- og heilsuhjálparar. Starvsfólkini, sum landsstýrið ætlar at geva eitt lønarlyft arbeiða í stóran mun á kommunala sáttmálaøkinum, tí hevur fráboðanin um, hvør skal hava eitt lønarlyft, og hvussu lønarlyftið skal býtast millum starvsbólkarnar – og ikki minst, hvussu kostnaðurin av lønarlyftinum skal endurgjaldast kommununum, fylt nógv seinastu tíðina.

Landsstýriskvinnan við Fíggjarmálum hevur alment boða frá, at lønarlyftið kemur at kosta um 47 mió. kr. og at lønarlyftið ikki skal verða ein partur at samráðingunum. Lønarlyftið skal býtast millum omanfyrinevndu starvsbólkar við virknaði frá 1. januar 2024.

Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið eru í løtuni í einum samskifti við Heilsurøktarafelagið, Føroya Pedagogfelag og Heilsuhjálparafelagið um ætlaða lønarlyftið. Landsstýriskvinnan við Fíggjarmálum hevur greitt avvarðandi fakfeløgunum frá, at lønarlyftið er eitt vallyftið, sum landsstýrið ætlar at halda. Landsstýriskvinnan hevur gjørt feløgunum greitt, at lønarlyftið er ikki ein partur av samráðingunum.
Landsstýrið hevur sett lønarlyftið á breddan. Uppgávan hjá Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum er at fylgja væl við, hvussu kostnaðurin av lønarlyftinum verður býttur út á starvsbólkarnar – og at syrgja fyri, at Kommunufelagið verður kunnað um kostnaðin av lønarlyftinum leypandi.

Landsstýrið hevur alment boðað frá, at kommunurnar verða kompenseraðar fyri lønarlyftið.

## Stytt arbeiðsvika

Samgongan hevur eisini ætlanir um at stytta arbeiðsvikuna úr 40 niður í 37 tímar. Hetta ætlar landsstýrið skal gerast við lóg galdandi fyri allan arbeiðsmarknaðin.

Arbeiðstíðin er ein av týdningarmestu spurningunum í eini sáttmálasamráðing. Ein spurningur, sum hevur beinleiðis ávirkan á fíggjarligu viðurskiftini hjá kommununum – og tí eisini ein uppgáva, sum partarnir á arbeiðsmarknaðinum eiga at loysa við samráðingarborðið.

Verður arbeiðsvikan stytt, so sum landsstýrið ætlar, úr 40 tímum niður í 37 tímar, fer hetta at hava við sær eina hækking av tímalønini á 8,1%. Talan er eftir okkara tykki um eitt beinleiðis inntriv í samráðingarrættin hjá kommununum.

At arbeiðsvikan verður stytt so munandi, fer umframt at hava búskaparligar avleiðingar, eisini at hava við sær, at kommunurnar koma undir enn størri trýst við at manna øll størv og vaktir á m.a. eldraøkinum og á dagstovnaøkinum. Á hesum økjum eru kommunurnar frammanundan raktar av starvsfólkatroti.

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið er ikki ímóti, at arbeiðsvikan verður stytt niður í t.d. 37 tímar, men felagið meinar, at hetta skal gerast í samráðingum millum partarnar á arbeiðsmarknaðinum.

Samlaði lønarkostnaðurin hjá kommununum er umleið 1,7 mia. kr. Roknað verður við, at stytta arbeiðsvikan fer at økja um samlaða lønarkostnaðin við góðum 5%, ella við umleið 90 mió. kr. árliga.

## Fyrireikingartíð og normeringar á dagstovnaøkinum

Akkurát hvat liggur í hesum, sum stendur í samgonguskjalinum um, at samgongan vil menna dagstovnaøkið – og at meira tíð skal vera til námsfrøðiligt virksemi, tað vita vit ikki.

Dagstovnaøkið er kommunalt – og tað eru kommunurnar, sum bæði gjalda og valda á dagstovnaøkinum. Tað er tí undranarvert, at samgongan leggur seg út í eina beinleiðis skipan av dagliga virkseminum á dagstovnaøkinum, í fyrireikingartíðina. Landsstýrið hevur hvørki myndugleika ella førleika til at arbeiða við tilrættisleggjanini av dagliga virkseminum á dagstovnunum.
Sum greitt frá niðanfyri, so hava sáttmálapartarnir Pedagogfelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið gjørt kanning, har dentur var lagdur á at lýsa verandi skipanir á dagstovnaøkinum – og at koma við tilmæli um, hvussu kommunurnar kunnu skipa fyrireikingartíðina frameftir. Tilmælini eru send kommununum og liggja á heimasíðu felagsins.

Hvørjar hugsanir landsstýrið hevur við normeringum á dagstovnaøkinum er okkum heldur ikki greitt. Dagstovnalógin hevur, sum er, áseting um normeringar av pedagogum og hjálparfólkum. Í § 8, stk. 4 er soleiðis ásett "*Starvsfólkabýtið á dagstovnum skal í minsta lagi verða 2/3 til námsfrøðingatímar og í mesta lagi 1/3 til hjálparfólkatímar. Í serligum førum kann landsstýrismaðurin víkja frá hesum kravi.*"

Um landsstýrið hevur ætlanir um at broyta verandi starvsfólkanormeringar – ella um ætlanin er at áseta minimumsnormeringar í lógini er sum sagt ikki greitt. Púra greitt er tað kortini, at tað eru kommunurnar, sum umsita dagstovnaøkið, og at tað tí eru kommunurnar, sum hava bestu fortreytirnar fyri at siga, hvussu økið skal skipast frameftir.

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið er sáttmálapartur á dagstovnaøkinum saman við Pedagogfelagnum. Sum sáttmálapartur hava við góða fatan av dagstovnaøkinum, og eiga vit tí at vera partur í bólkinum, sum verður settur at endurskoða dagstovnalógina.

## Sáttmálasamráðingar 2023 –

Sáttmálasamráðingarnar á almenna arbeiðsmarknaðinum eru júst tiknar upp aftur í vikuni.

Fíggjarmálaráðið og Felagið Føroyskir sjúkrarøktarfrøðingar handaðu hvørjum øðrum krøv mikudagin 19. apríl 2023.

### Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar

Sáttmálin hjá Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar fór úr gildi 1. januar 2023. Kommunala Arbeiðsgevarafelagið hevur serstaka avtalu við Felagið Føroyskir sjúkrarøktarfrøðingar, um sjúkrarøktarfrøðingar á kommunala sáttmálaøkinum, í stóran mun á eldraøkinum. Avtalan inniber, at sjúkrarøktarfrøðingar fylgja ásetingunum í sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og Felagið Føroyskar Sjúkrarøktarfrøðingar. Avtalupartarnir eru tó samdir um saman at viðgera og taka avgerð um øll viðurskifti, størv og flokkingar, ið eru serstøk fyri kommunala arbeiðsøkið.

Tað arbeiða út ímóti 200 ársverk av sjúkrarøktarfrøðingum á kommunala sáttmálaøkinum, tí er tað umráðandi, at vit hava samráðingar við Felagið Føroyskir sjúkrarøktarfrøðingar um viðurskifti, sum eru í serstøku avtaluni partanna millum – og at vit, tá tørvur er á tí luttaka í felags samráðingunum við felagið saman við Fíggjarmálaráðnum.

### Føroya Handverkarafelag / Landsfelag Handverkaranna

Sáttmálin við handverkarafeløgini fór úr gildi tann 1. januar 2023.

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og handverkarafeløgini hava seinnu árini arbeitt nógv við at javnstilla lønirnar og arbeiðstreytirnar hjá handverkarum, sum eru limir á ávikavist feløgunum fyri handverkarar og í Starvsfelagnum.

Í seinastu semju okkara komu vit væl ávegis við fleiri av viðurskiftunum m.a. fingu handverkarar áseting í sáttmálan um starvsmetingarnevnd, eins og hjá Starvsfelagnum. Sarvsmetingarnevndin skal arbeiða við at útbyggja og eftirmeta lønarskipanina, umframt at viðgera øll flokkingarmál, ið verða reist av antin Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum ella Føroya Handverkarafelag ella Landsfelag Handverkaranna.

Lønirnar hjá handverkarum tvørtur um sáttmálarnar er eisini meira eins í dag, og er hetta serliga orsakað av longdum sáttmálaskeiði - fram til 1. januar 2023.

Samráðingarnar við handverkararnar verða tiknar upp aftur í næstum – og arbeitt verður uttan iva víðari við, at lønirnar hjá øllum handverkarum á kommunala/almenna sáttmálaøkinum skal liggja á sama støði yvir tíð.

### Pedagogfelagið

Sáttmáli við Føroya Pedagogfelag fór úr gildi tann 1. apríl 2023.

Føroya Pedagogfelag er eitt av fakfeløgunum, sum hava fingið lovað eitt lønarlyft fyrst í komandi ári.

Lønarlyftið, sum landsstýrið hevur lovað felagnum galdandi frá 1. januar 2024 er ikki ein partur av komandi samráðingunum. Hinvegin, so kann hetta lyftið hava við sær ávirkan á samráðingarnar – eins væl og á aðrar samráðingar.

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Pedagogfelagið hava, sum áður greitt frá latið gera kanning av fyrireikingartíðini á dagstovnaøkinum. Kanningin er liðug, og partarnir hava saman gjørt tilmæli um, hvussu kommunurnar frameftir kunnu skipa fyrireikingartíðina á dagstovnaøkinum, sí meira um hetta niðanfyri.

Ætlanin við kanningini var at lýsa verandi skipanir – og fyri sáttmálapartarnar at finna útav, um sáttmálin er ein forðing fyri tilrættisleggjanina av arbeiðinum á dagstovnunum.

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið er av tí fatan, at sáttmálin ikki er ein forðing fyri, at kommunur/dagstovnar tilrættisleggja – og eftirmeta námsfrøðiliga arbeiði á dagstovnunum í trá við dagstovnalógina – og stevnumiðini hjá kommununum.

Vit í Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum vænta, at lønarlyftið – og harvið, hvussu starvsbólkarnir innanhýsis verða ávirkaðir av hesum kemur at fylla nógv í komandi samráðingunum. Haraftrat vænta vit, at nógv tíð fer at verða brúkt at umrøða fyrireikingartíðina og tíðina at eftirmeta námsfrøðiliga arbeiðið á dagstovnunum.

## Átøk sambært sáttmála

### Tilmæli – fyrireikingartíð á dagstovnaøkinum

Loksins er kanningin um § 10 í sáttmálanum við Føroya Pedagogfelag "tíð til annað arbeiðið liðugt" – og handað pørtunum. Fylgibólkurin legði fram tilmæli á felags evnisdegi á Hotel Føroyum mikudagin tann 22. mars 2023. Allir leiðarar og starvsfólk á dagstovnunum í øllum Føroyum, sum eru limir í Føroya Pedagogfelag, eru spurd. Av hesum hava 48 dagstovnaleiðarar svarað, sum er eitt svarprosent á 71%. Av teimum spurdu 322 starvsfólkunum var svarprosentið 32%.

Ein av niðurstøðunum er, at leiðarar á dagstovnum brúka í miðal 9 tímar til fyrireiking og 4 tímar í miðal til eftirmeting um vikuna. Námsfrøðingar brúka 3 tímar og hjálparfólkini 1,8 tímar í miðal til fyrireiking um vikuna. Harumframt brúka námsfrøðingar 1 tíma og hjálparfólkini 0,6 tímar í miðal um vikuna til eftirmeting. Sostatt gevur kanningin eina ábending um, at bæði leiðarar og starvsfólk hava tíð til fyrireiking og eftirmeting á dagstovnaøkinum – og meira enn 1 tíma um vikuna, sum § 10 í sáttmálanum ásetur, at námsfrøðingar á dagstovnum kunnu brúka til fyrireiking. Eftirsum kanningin vísir á miðaltøl, eru sjálvandi leiðarar og starvsfólk, sum brúka bæði meiri og minni tíð enn hesi miðaltøl.

Tá tað í kanningini verður spurt, í hvussu stóran mun leiðarar og starvsfólk meta seg hava neyðugu tíðina til fyrireiking, svara 25% av leiðaranum, at tey í sera lítlan og lítlan mun hava hóskandi tíð til fyrireiking, 36% svara partvíst, og 39% meta seg í stóran og sera stóran mun hava tíð til fyrireiking. Fyri starvsfólkini svara 22% av námsfrøðingunum og 15% av hjálparfólkunum, at tey meta seg í stóran og sera stóran mun hava neyðugu tíðina til fyrireiking, meðan 51% av námsfrøðingunum og 54% av hjálparfólkunum meta, at tey í lítlan og sera lítlan mun hava neyðugu tíðina til eftirmeting.

Fylgibólkurin mælir m.a. til, at tað er dagstovnaleiðarin, sum eigur at skipa fyrireikingina og eftirmetingina, og at hetta arbeiðið verður gjørt, tá umstøðurnar loyva tíð. Tá stovnurin til dømis er raktur av sjúku millum starvsfólk, má arbeiðið við fyrireiking og eftirmeting víkja, og barnatíðin raðfestast. Hinvegin tá ið øll starvsfólk eru tøk, og barnatalið er lágt, tá er møguligt, at leiðarin ásetir meira tíð til fyrireiking og eftirmeting. Hjá 44% av námsfrøðingunum kemur tað ofta ella sera ofta fyri, at tey ikki fyrireika seg, tí tað eru ov fá starvsfólk á stovuni. Tilmælini eru at finna á heimasíðu felagsins www.kaf.fo .

## Ávegis átøk

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið hevur í semjuni við m.a. Starvsfelagið og Heilsuhjálparafelagið gjørt avtalu um felags átøk.

### Átak viðv. vaktarskipanini á Sløkkiliðsstøðini

Arbeiðið við at endurskoða vaktarskipanina hjá sløkkiliðsfólkum er í gongd.

Hyggjast skal at innihaldinum í arbeiðinum í vaktini – og at samsýningini fyri hetta arbeiðið.

Samsýningin til sløkkiliðsfólk er hækkað nógv seinastu árini, serliga í samband við samráðingar og seming. Partarnir hava ikki áður gjørt eina meting av, um vaktin hjá sløkkiliðsfólki kann metast at verða ein skipan, sum gevur rætt til fult vaktargjald sambært sáttmála ella ikki.

Samstarv er nú millum Tórshavnar kommunu, Sløkkiliðsstøðina og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, sum hevur til endamáls at lýsa vaktarskipanina til fulnar – og metast skal um, hvørt vaktarskipanin er tíðarhóskandi.

### Átak viðv. setanarviðurskiftunum hjá heilsu- og heimahjálparum

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Heilsuhjálparafelagið hava avtalu um, at kanna setanarviðurskiftini hjá heilsu- og heimahjálparum, sum starvast á eldraøkinum. Kannast skal um grundarlag er fyri at seta heilsu– og heimahjálparar í starv við hægri- ella fullum setanarbrøki. Skipast skal síðani fyri felags evnisdegi, har ljós skal varpast á setanarviðurskiftini og fakligheitina hjá starvsfólkunum, sum arbeiða á eldraøkinum.

Partarnar eru ikki komnir ásamt um, hvussu umfatandi kanningin skal vera - og tískil heldur ikki, nær kanningin fer av bakkastokki.

Umsitingin hevur tó kunnað øll eldraøkini hvør sær um, at kanningin er ávegis.
Eldraøkini eru vitandi um, at møguleiki skal vera fyri at geva starvsfólki hægri brøk, tá høvið býðst. At broyta starvsetanir kann t.d. gerast tá starvsfólk fara úr starvi – tá kunnu arbeiðsgevarar hugsa um at bjóða starvsfólki í niðursettari tíð at arbeiða meira. Hetta kann gerast, áðrenn støða verður tikin til um starvið skal lýsast leyst.

Eldraøkini ynskja at lýsa eftir starvsfólkið fulla tíð, men royndirnar vísa, at starvsfólk ynskja at arbeiða niðursetta tíð, og tískil verða tey sett niðursetta tíð. Eldraøkið er tó á einum málið um, at tað hevði lætt nógv um hjá arbeiðsgevarunum, um starvsfólk arbeiddi fulla tíð í mun til at fáa vaktir mannaðar og ráðleggingina yvirhøvur. Tó gera ásetingarnar um m.a. hvílitíð í arbeiðsumhvørvislógini og

ásetingarnar um frítíðarskeið í sáttmálanum við Heilsuhjálparafelagið, at tað er avbjóðandi at bjóða starvsfólki, sum arbeiða í skiftivaktum fulla tíð.

Eldraøkini arbeiða áhaldandi við førleikamenning til øll starvsfólk á eldraøkinum – eisini limir í Heilsuhjálparafelagnum. Eldraøkini eru sera tilvitað um áhaldandi at styrkja um fakligheitina á økinum, tá arbeiðsuppgávurnar alsamt gerast meira og meira samansettar við eldru borgarum við alskyns diagnosum. Eisini er arbeiðið við førleikamenning ein liður í at arbeiða við rekruttering - og við at fasthalda starvsfólk á eldraøkinum. Nógv orka verður løgd í at bjóða starvsfólkunum førleikamenning, hetta fyri m.a. at vekja áhugan hjá ófaklærdu starvsfólkunum at nema sær útbúgving innan økið soleiðis, at tey koma aftur á eldraøkið at arbeiða.

Næsta stig er at tosa við Heilsuhjálparafelagið og finna semju um, hvussu partarnir skipa kanningina.

# Arbeiðsbólkar

## Broytingar í starvsmannalógini

Løgtingið samtykti í apríl mánaði í 2022, at heita á landsstýrið um at fyrireika og leggja fyri løgtingið uppskot til broytingar í starvsmannalógini.

Bakgrundin fyri uppskotinum til samtyktar er, at starvsmannalógin mestsum ikki er broytt síðani, at hon varð sett í gildi í 1958. Danska starvsmannalógini er broytt sera ofta síðani tá. Nógvar av broytingunum hava uppruna í ES lóggávu, men eisini úrslit av samráðingum á tí danska arbeiðsmarknaðinum.

Stórur munur er á donsku og føroysku lógini í dag, harímillum kann nevnast, at tíðarkravið fyri at koma undir lógina í Føroyum er umleið 20 tímar í meðal um vikuna, meðan tað í Danmark er 8 tímar. Danska lógin hevur ásetingar um viðurlag fyri ósakliga uppsøgn – og serligt viðurlag fyri uppsøgn av starvsfólkum, sum hava verið leingi í starvi 12 og 17 ár. Nevndu ásetingar um viðurlag í sambandi við uppsøgn eru ikki í føroysku lógini.

Ætlanin er, at dagføra starvsmannalógina í trimum stigum:

1. Fakligt arbeiði saman við pørtunum á arbeiðsmarknaðinum. Greining av galdandi rætti í dag bæði í Føroyum og í øðrum londum
2. Samráðing við viðkomandi partar á arbeiðsmarknaðinum um at gera broytingar og tillagingar í starvsmannalógini
3. Politisk viðger og framløga av lógaruppskoti

Umhvørvis- og Vinnumálaráðið hevur staðið fyri greiningararbeiðinum - og hevur sett ein fakbólk at vera við í arbeiðinum. Nú liggur málið hjá landsstýriskvinnuni í arbeiðsmarknaðarmálum. Í fakbólkinum eru umboð fyri partarnar á arbeiðsmarknaðinum. Kommunala Arbeiðsgevarafelagið umboðar almennu arbeiðsgevararnar.

# Netverk

## Dagstovnaøkið

Endamálið við netverkinum er faklig sparring og vitanardeiling millum leiðarnar/ábyrgdarpersónar í einstøku kommununum umframt, at Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Kommunufelagið ynskja eitt tættari samband við dagstovnaøkið.

Mál, sum verða viðgjørd í dagstovnanetverkinum í 2022 eru millum annað markamótið móti Almannaverkinum, broyting í tænastuni frá Sernám og hagtøl á dagstovnaøkinum.

### Markamót móti Almannaverkinum

Mál, sum hava verið viðgjørd í 2022 er, sum so oftani fyrr, § 5 stk. 3 í dagstovnalógini og markamóti móti Almannaverkinum.

> § 5. [3)] *Børn við serligum tørvi hava rætt til tilboð um pláss á dagstovni og dagrøkt á jøvnum føti við onnur børn, sum búgva í kommununi, sambært § 3.*
>
> *Stk. 2. Til børn við serligum tørvi verða veittar nøktandi hølisumstøður og námsfrøðilig tilboð.*
>
> *Stk. 3.* [2)] *Í ivamálum um tilboð skal veitast sambært hesi lóg, skal málið ávísast víðari til Almannaverkið, ið tekur avgerð.*

Kommunur leggja mál fyri ivamálsnevndina undir Almannaverkinum, tá børn ikki megna at vera í serstovum á kommunala dagstovnaøkinum, men ongin avgerð er enn tikin um, at børn fáa bjóðað tilboð frá Almannaverkinum. Sum ásetingarnar eru orðaðar í lógini og viðmerkingunum til lógina, so tykist trupult at finna markið, nær er talan um eitt serligt barn, sum Almannaverkið eigur ábyrgdina av. Avgerðin í ivamálsnevndini kann kærast til Føroya Kærustovn, sum so aftur kann kærast í Føroya Rætt. Tíðin er búgvin til, at kommunurnar kæra avgerðirnar tiknar í ivamálsnevndini fyri at fáa greiðari rættarstøðu og møguliga broyta ásetingarnar í lógini.

### Broyting í tænastuni frá Sernám

Tann 1. september 2022 boðaði Sernám frá, at tænastan er broytt til kommunala dagstovnaøkið fram til juni 2023 vegna starvsfólkatrot. Broytingin inniber, at ráðgevingini til dagstovnar verður avmarkað til talu- og menningarøkið og rørslu- og sansamenningarøkið. Tað merkir, at ráðgeving frá sernámsfrøðiligum ráðgeva og/ella sálarfrøðingi ikki er tøk hetta tíðarskeið. Tó ber til fáa ráðgeving í mun til børn, har ivamál er um útsetan av skúlabyrjan, ella ivamál er um, hvat rætta skúlatilboðið er.

Kommunufelagið hevur verið á fundi við táverandi landsstýrismann, Jenis av Rana um støðuna, sum vísir á, at landsstýrismaðurin hevur ikki tikið avgerð um at skerja virksemið á dagstovnaøkinum, men stjórin á Sernámi stendur við ábyrgdini/avgerðini sjálv.

## Hagtøl á dagstovnaøkinum

Táverandi Uttanríkis- og Mentamálaráðið (UMMR) ynskti, at Kommunufelagið luttók í tilgongdini at lýsa kommunala dagstovnaøkið í hagtølum. Hagtøl fyri dagstovnaøkið eru tikin av heimasíðuni hjá Hagstovu Føroya, tí hesi tøl vóru ófullfíggjaði og ikki eftirfarandi. Kommunala Arbeiðsgevarafelagið hevur saman við Kommunufelagnum verið á fund við Hagstovu Føroya og UMMR, har ætlanin er, at øll børn, ið eru innskrivaði á kommunalum dagstovnunum skulu skrásetast við p-tali fyri at tryggja, at tølini verða røtt. Hagstova Føroya vendir aftur til partarnar viðv., hvat ein tílík hagtalslýsing av dagstovnaøkinum væntast at kosta. Støða er ikki tikin til um, hvør skal bera kostnaðin – land ella kommunur.

## Samsýning til borgarstjórar

Borgarstjórar hava víst á, at samsýningin til borgarstjórar ikki longur er hóskandi samanborið við aðrar leiðaralønir í m.a. kommunalu fyrisitingunum.

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið hevur lýst gongdina í samsýningunum til borgarstjórar, síðani verandi kunngerð kom í ár 2000.

Tað er ásett í § 9, stk. 3 í kommunustýrislógini, at "Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um løn og eftirløn til borgarstjóra og varaborgarstjóra, tá hesin virkar í borgarstjórans stað."

Hesar reglurnar eru í kunngerð nr. 93 frá 9. september 2014 um samsýning o.a. sambært kommunustýrislógini.

Bý- ella bygdaráðið skal í kommunustýrisskipanini áseta samsýningina til borgarstjóran. Kunngerðin setir tó mørk fyri, hvussu høgar samsýningarnar kunnu vera.

Mørkini eru í mun til íbúgvaratalinum í kommununi tann 1. januar í valárinum. Flokkingarnar eru skipaðar í lønartalvuni fyri Felag Tænastumanna Landsins.

Samsýningarnar til borgarstjórar blivu broyttar í 2006, tá fóru allir borgarstjórar ein flokk longri upp – uttan borgarstjórar í kommunum, sum høvdu millum 1.000 og 1.499 íbúgvar - og teir sum um hetta mundi høvdu fleiri enn 2.000 íbúgvar.

Hækkingar hava verið í kommunalu leiðaralønunum, og talið av kommunalum starvsfólkum, ið fáa eina lutfalsliga høga løn er eisini hækkað. Lønarskipanin hjá landsstýrisfólkum varð eisini broytt í 2015.

Millum grundgevingarnar fyri broytingunum í lønunum hjá borgarstjórum í 2006 vóru, at lønirnar hjá borgarstjórunum mugu fylgja øðrum leiðaralønum og lønum hjá starvsfólkum í kommunalu fyrisitingini.

Broytingarnar í lønunum hjá almennum/kommunalum leiðarum og dagføringin av lønunum hjá landsstýrisfólkum kunnu tala fyri, at borgarstjóralønirnar eiga at verða dagførdar.

Málið er lagt til Kommunufelagið.

## Gerðarrættarmál

### Starvsaldur tá stig fella burtur

Føroya Pedagogfelag reisti í februar 2022 mál móti Fíggjarmálaráðnum í Fasta Gerðarrætti.

Av tí, at Kommunala Arbeiðsgevarafelagið er partur í sáttmálanum og semjuni, sum eru grundarlag fyri kærumálinum bleiv biðið um, at KAF kom uppí málið.

Upprunin til málið er semjan, sum varð gjørd í januar 2018. Í semjuni var ein partur avtalaður um, at nøkur stig blivu løgd afturat lønargongdini hjá pedagogum, og nøkur stig blivu tikin úr lønargongdini.

Málið snýr seg um, hvussu starvsaldur skal viðgerast, tá ið stig vera tikin úr lønargongdini.

Í sáttmálanum er ásett, at pedagogar eru tvey ár á hvørjum stigi. Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið meta, at tá ið t.d. stig 12 verður tikið úr lønargongdini, og teir pedagogar, sum

eru á stig 12 skulu flytast á stig 13, so skulu hesir vera 2 ár á stig 13, áðrenn teir aftur flyta á næsta stig í lønargongdini.

Pedagogfelagið metir, at hesir skulu hava tíðina teir hava verið á stig 12 við sær á stig 13.

Um vit fylgdu leistinum hjá Pedagogfelagnum, so vildi ein fylgja av hesum verða, at starvsfólk við lægri starvsaldri yvirhálað starvsfólk við hægri starvsaldri. Hetta er í stríð við grundsjónarmiðið í sáttmálanum um, at starvsfólk við longri starvsaldri skulu hava betri løn og rættindi enn starvsfólk við styttri starvsaldri.  Arbeiðsgevararnir taka ikki undir við sjónarmiðinum hjá felagnum.

Tað er óvist, nær úrskurðarfundur verður í málinum, men væntandi er ikki nógv eftir av viðgerðini av málinum.

## Samanumtikið

Fleiri samráðingar liggja fyri framman, og gongur tað sum í samráðingunum higartil, so skulu vit vænta, at fleiri av samráðingunum enda í seming. At fleiri av okkara samráðingum enda í seming er ein óheppin gongd, men ikki ein gongd, sum vit kunnu gera nakað við einsamøll.

Seinastu árini, hava vit í Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum gjørt fleiri semjur við fakfeløgini um samstarv. Vit hava t.d. í fleiri umførum samstarva við Pedagogfelagið, vit – starvsfólk og nevnd hava havt arbeiðsdagar saman við nevndini í Pedagogfelagnum, har vit hava tosað um ymisk viðurskifti, sum partarnir ikki hava somu fatan av m.a. um fyrireikingartíðina á dagstovnaøkinum. Partarnir hava nú, sum greitt er frá omanfyri, latið gera kanning av fyrireikingartíðini, og vit hava gjørt felags tilmæli um, hvussu kommunurnar kunnu skipa hesi viðurskifti frameftir til frama fyri alt dagstovnaøkið.
Vit meina, at økta samstarvið við fakfeløgini skapar góðar relatiónir – og vit vænta, at meira samstarv fer at gera tað møguligt í framtíðini at finna felags semjur, uttan seming.

Eg skal at enda takka nevndini og starvsfólkunum fyri góða arbeiðið og góða samstarvið í farna ári.

Takk fyri.

Per Martin Gregersen, formaður

**Nevnd og starvsfólk í Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum**

**Í nevndini í Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum sita:**

Per Martin Gregersen, formaður Eystur kommuna
Jógvan Kruse, næstformaður Sunda kommuna
Dávur Juul, nevndarlimur Fuglafjarðar kommuna
Bjarni Johansen, nevndarlimur Vágs kommuna
Bogi Bendtsen, nevndarlimur Elfelagið SEV
Jóhannus Danielsen, nevndarlimur IRF

**Starvsfólk:**

Anita Fuglø, leiðari
Bina Reginsdóttir, fulltrúi
Bjarni Mortensen, fulltrúi

**Sáttmálar og avtalur**

- Føroya Pedagogfelag fyri námsfrøðingar og hjálparfólk
- Starvsmannafelagið, høvuðssáttmálin og sáttmálin fyri dagrøktarar
- Heilsuhjálparafelag
- Danska Tannlæknafelagið
- Føroya Skipara- og Navigatørfelag
- Maskinmeistarafelagið
- Heilsurøktarafelagið
- Føroya Handverkarafelag/Landsfelag Handverkaranna
- Føroya Arbeiðarafelag fyri dagrøktarar

  Serstakar avtalur

  1. Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya
  2. Akademikarafelag Føroya
  3. Føroya Arbeiðarafelag – renovatión
  4. Havnar Arbeiðarafelag – renovatión
  5. Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar
  6. Fysioterapeutfelag Føroya
  7. Ergoterapeutfelagið
  8. Kost- og Føðslufelag Føroya

## Viðtøkur fyri Kommunala Arbeiðsgevarafelagið

**§ 1. Navn og limaskapur**

Stk. 1. Navn felagsins er Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, stytt KAF.

Stk. 2. KAF er sjálvstøðugt limafelag undir Kommunufelagnum, stytt KF.

Stk. 3. Limir í felagnum eru umframt KF, Elfelagið SEV, stytt SEV og L/F Interkommunali Renovatiónsfelagsskapurin, stytt IRF.

Stk. 4. Heimstaður felagsins er Tórshavn.

**§ 2. Endamál felagsins**

Stk. 1. Endamál felagsins er at fremja áhugamál limanna í øllum málum um lønar- og setanarviðurskifti starvsfólkanna. Hetta verður gjørt við at:

• samskipa lønarlagið og samráðast um sáttmála við starvsfólka- og fakfeløg, sum hava samráðingarrætt

• røkja áhugamál limanna í málum um lønar- og setanarviðurskifti, starvsmetingum, útbúgving o.a., og røkja samskifti við tey starvsfólka- og fakfeløg, sum samráðst verður við og myndugleikar annars, við neyðugum atliti til kommustýrislógina § 5, stk. 5.

• virka fyri og ansa eftir, at galdandi sáttmálar verða hildnir

• gera sítt til, at tað slepst undan trætumálum millum arbeiðsgevara og starvsfólk, ella um hetta ikki ber til, at royna at fáa tey loyst á friðarligan hátt, uttan arbeiðssteðg. Verður arbeiðssteðgur ella trætumál, røkir felagið, tá heitt verður á tað, mál arbeiðsgevaranna so langt, sum hóskandi verður hildið

• virka fyri, at trætumál limanna millum verða loyst

•við skeiðvirksemi ella á annan hátt upplýsa limir felagsins um viðurskifti, ið viðvíkja kommunalum/interkommunala arbeiðsgevara áhugamálum

**§ 3. Upptøka**

Stk. 1. KF og interkommunalir felagsskapir í Føroyum kunnu gerast limir við skrivliga at senda umsókn til nevnd felagsins.

Stk. 2,  Limir í felagnum skriva undir viðtøkur felagsins, soleiðis sum tær eru, ella seinni á lógligan hátt kunnu verða broyttar

**§ 4. Útmeldan**

Stk. 1. Eingin kann siga seg úr felagnum, uttan við innskrivaðum brævi og við 6 mánaða freist.

Stk. 2. Hóast limur sigur seg úr felagnum, er hann framvegis bundin av galdandi sáttmálum, til hesir halda uppat.

Stk. 3. Limur, sum fer úr felagnum, hevur einki krav móti felagnum.

**§ 5. Ársfundur**

Stk. 1. Ársfundur verður hildin á hvørjum ári innan 1. mai.

Stk. 2. Nevndin í KAF hevur rætt til at luttaka á aðalfundinum hjá KF, men ikki skyldu at luttaka.

Stk. 3. Innkalling til ársfund verður gjørd í minsta lagi 14 dagar frammanundan.

Stk. 4. Saman við innkallingini verður sendur grannskoðaður roknskapur og onnur innkomin mál.

Stk. 5. Atkvøðurættur: KF hevur 4 atkvøður, SEV og IRF hava 1 atkvøðu hvør. Ársfundurin er viðtøkuførur, tá meira enn helmingurin av atkvøðutalinum eru umboðað. Allar avgerðir á ársfundinum verða tiknar við vanligum atkvøðumeiriluta.

Stk. 6 Mál, sum skulu viðgerast á ársfundinum, skulu vera KAF í hendi seinast 4 vikur undan ársfundinum. Uppskot frá øðrum enn nevndini skulu vera felagnum í hendi í so góðari tíð, at tey kunnu takast við í fundarfráboðanina, um tey skulu koma til viðgerðar á aðalfundi.

Stk. 7. Ársfundurin verður skipaður við hesi skrá:

a) Formaðurin skipar fyri vali av fundarstjóra

b) Formansfrágreiðing um virki felagsins í farna ári.

c) Framløga av grannskoðaðum roknskapi

d) Innkomin mál.

e) Ymiskt

**§ 6. Nevndin**

Stk. 1. Í nevndini sita 6 limir, sum verða valdir av nýggjum eftir hvørt kommunustýrisval og virka til nýggj nevnd er vald. KF velur 4 limir, meðan SEV og IRF velja hvør sín lim. Á sama hátt verða 6 varalimir tilnevndir.

Stk. 2. Nýggj nevnd tekur við so skjótt, sum allir limirnir eru tilnevndir, og í seinasta lagi 1. mai.

Stk. 3. Nevndin ger sína egnu starvsskipan.

Stk. 4. Nevndin velur sjálv formann og næstformann.

Stk. 5. Nevndarfundur er so ofta, sum formaðurin metir tað vera neyðugt, ella um ein nevndarlimur setir ynski fram um tað.

Stk. 6. Nevndin er viðtøkufør, tá meira enn helmingurin av nevndarlimunum eru á fundi.

Stk. 7. Hvør nevndarlimur hevur eina atkvøðu, og avgerðir verða tiknar við vanligum meiriluta.

Stk. 8. Um tað, sum fer fram á nevndarfundi, verður gjørd fundarfrágreiðing, sum allir nevndarlimir góðkenna.

**§ 7 Skrivstovan**

Stk. 1. Fyrisitingin í KAF er partur av fyrisitingini í KF.

Stk. 2. Ovasta fyrisitingarliga leiðsla felagsins er stjórin í KF. Stjórin setur og loysir úr starvi starvsfólk í KAF í samráð við nevnd felagsins.

Stk. 3. Í øllum málum sambært § 2 virkar fyrisitingin í KAF undir leiðslu av nevnd felagsins.

Stk. 4. Skrivstovuleiðarin í KAF hevur dagligu fyrisitingina av felagnum um hendi og skal í samstarvi við stjóran í KF og nevnd felagsins umsita felagið innan fíggjarligu karmarnar og í samsvari við endamál felagsins.

**§ 8 Limagjald**

Stk. 1. Tá nýggir limir verða upptiknir, skal samráðast um limagjaldið.

Stk. 2. Formaðurin ger saman við stjóranum í KF og skrivstovuleiðaranum í KAF uppskot til fíggjarætlan fyri komandi ár, harundir ásetan av limagjaldi. Formaðurin leggur uppskotið fyri nevndina til góðkenningar í seinasta lagi tann 1. juli.

Stk. 3. KF rindar 2/3 av ásetta limagjaldinum. SEV og IRF rinda 1/3 av ásetta limagjaldinum, og av hesum rindar SEV 2/3 og IRF 1/3.

Stk. 4. Eingin limur heftir fyri skyldum felagsins við øðrum enn tí, sum avgjørt er at vera hansara partur av útreiðslunum, sambært fíggjarætlanini.

**§ 9 Tekning**

Stk. 1. Felagið verður teknað av nevndarformanninum saman við einum nevndarlimi ella saman við skrivstovuleiðaranum fyri KAF.

**§ 10 Samráðingarnevnd**

Stk. 1. Nevndin tilnevnir umboð og formann í samráðingarnevnd. Við sáttmálasamráðingar, sum viðvíkja SEV og IRF, kann umboð frá nevndu felagsskapum luttaka sum partur av samráðingarnevndini. Annars kann samráðingarnevndin, eftir meting nevndarinnar, víðkast við umboðum fyri teir einstøku limirnar.

Samráðingarnevndin kann, um nevndin ynskir tað, leita sær sakkunnleika aðrastaðni.

Stk. 2. Uppgávan hjá samráðingarnevndini er at samráðast við tey starvsfólka- og fakfeløg, sum hava rætt til at samráðast um øll sáttmálaviðurskifti.

Stk. 3. Samráðingarnevndin ger sína egnu starvsskipan.

**§ 11 Roknskapur og grannskoðan**

Stk. 1. Roknskapurin hjá KAF er ein sjálvstøðugur roknskapur, sum er partur av roknskapinum hjá Kommunufelagnum og verður grannskoðaður, sum ein partur av hesum.

Stk. 2. Inntøkur og útreiðslur fyri KAF verða neyvt atskildar frá fíggjarviðurskiftunum hjá KF annars.

**§ 12 Tagnar- og upplýsingarskylda**

Stk. 1. Limir felagsins hava tagnarskyldu viðvíkjandi upplýsingum um innanhýsis viðurskifti í felagnum.

Stk. 2. Limirnir hava skyldu til, eftir áheitan frá nevndini, at lata teir upplýsingar, ið hava týdning fyri at kunna samráðast, umframt upplýsingar um lønar-, arbeiðs- og útbúgvingarviðurskifti fyri starvsfólkið. Hesir upplýsingar verða viðgjørdir í trúnaði.

**§ 13 Trætumál**

Stk. 1. Verður arbeiðssteðgur ella trætumál millum lim í felagnum og starvsfólk tess ella fakfelagið, binda hinir limirnir í felagnum seg at stuðla og hjálpa viðkomandi limi mest møguligt við m.a. at taka lut í móttiltøkum, sum nevndin í felagnum samtykkir at seta í verk.

Stk. 2. Allir limir binda seg til, um nevndin boðar frá tí, ikki at seta fólk hjá teimum limum í starv, har arbeiðssteðgur er, fyrr enn hann er hildin uppat.

**§ 14 Gerðarrættur**

Stk. 1. Trætumál millum felagið og lim kann leggjast fyri gerðarrætt.

Stk. 2. Í gerðarrættinum eru tveir limir, har felagið velur annan og limurin hin, umframt ástøðumann, sum verður tilnevndur av Føroya rætti.

Stk. 3. Avgerðin hjá gerðarrættinum er endalig og kann ikki leggjast fyri vanligu dómstólarnar.

**§ 15 Avtøka av felagnum**

Stk. 1. Felagið verður tikið av, tá ið minst ¾ av limunum ynskja tað.

Stk. 2. Verður felagið tikið av, verða ognir felagsins býttar millum limir felagsins á tann hátt, at miðaltalið fyri limagjaldið trý tey seinastu árini gevur lutfalstalið til hvønn lim.

**§ 16 Gildiskoma**

Stk. 1. Hesar viðtøkur fáa gildi, tá ið tær eru samtyktar á aðalfundi í KAF.

Tórshavn hin 12. mars 2014